

# ARBEIÐSTÍÐIN

## HJÁ FÓLKASKÚLALÆRARUM

MARS 2016

# Avtala um arbeiðstíð hjá lærarum í føroyska fólkaskúlanum

## Inngangur

Avtalan um arbeiðstíð hjá lærarum fólkaskúlans er ein rammuavtala. Hetta hevur við sær, at einstaki skúlin, innan settar karmar, leggur sítt virksemi til rættis uttan at vera ov fast bundin at staklutum.

Dentur verður lagdur á, at tað altíð skal vera samsvar millum arbeiðstíð lærarans og námsfrøðiliga veruleikan í skúlanum. Sambært løgtingslóg um fólkaskúlan ásetir skúlastýrið meginreglur um virksemi skúlans eftir uppskoti frá leiðslu og lærarum, og innanfyri hesar karmar ráðleggja leiðsla og lærarar ítøkiliga virksemið.

Meginreglan skal vera, at arbeiðið í skúlanum verður fyriskipað smidliga og einfalt. Tað tryggjar lærаratoyminum og læraranum ávirkan í sambandi við at fyriskipa undirvísing í einstøku flokkunum og árgangunum. Hugsanin er, at arbeiðstíðin hjá einstaka læraranum verður skipað sum ein heild.

Arbeiðstíðin er í tveimum høvuðspørtum:

1. egintíð
2. skúlatíð

## Egintíð

Egintíðin er tann tíð, sum lærarin nýtir til m.a. at ráðleggja, fyrireika og eftirmeta sína undirvísing, gera ársætlanir og samskifta við foreldur uttan fyri skúlatíðina.
Lærarin ræður sjálvur fult og heilt yvir egintíðini, og leiðslan kann ikki áleggja honum aðrar uppgávur í hesum partinum av arbeiðstíðini.

Hjá lærarum, sum, umframt vanligu undirvísingina, røkja serligar uppgávur t.d. skúlabókavørðir, skúlavegleiðarar, telduvørðir, savnssamskiparar og skrivarar í námsfrøðiligu ráðunum, verður seruppgávan býtt sundur í undirvísing og fyrisiting, og egintíð verður bert roknað av undirvísingartíðini (sí avtalu um tímar til serligar uppgávur).

## Skúlatíð

Skúlatíðin fatar um allar uppgávur lærarans, sum ikki eru partur av egintíðini. Partar av skúlatíðina eru m.a. felags ráðlegging, floksundirvísing, bólka– og valbólkaundirvísing, steðgir og fríkorter, lærarasamstarv, samstarv við onnur, flokslærarauppgávan, samstarv millum heim og skúla, eftirútbúgving, setursskúli, útferðir og próvtøkur.

<u>Steðgir og fríkorter</u>
Tíðin, sum verður sett til steðgir og fríkorter, skal í høvuðsheitum verða brúkt saman við næmingunum. Talan kann vera um umsjón t.d. í garðinum, á gongini og í skúlastovuni. Tað er ymiskt, hvørjari umsjón tørvur er á. Ein flokkur kann t.d. hava brúk fyri, at lærarin er inni í skúlastovuni í fríkorterinum ella at serliga verður hildið eyga við flokkinum ella ávísum næmingum eina tíð.

Teir steðgir, sum eru millum tveir fylgjandi tímar, telja við við teimum minuttum, sum eru millum tímarnar. Talan kann t.d. vera um, at onkur steðgur er 10 minuttir og onkur er 15 minuttir. Roknað verður har afturat við samanlagt 10 minuttum undan fyrsta tíma og eftir síðsta tíma á tímatalvuni hjá læraranum.

Leiðslan ræður yvir hesi tíðini.

Felags ráðlegging og skúlamenning

Til tess at skúlin kann vera í støðugari menning, verður tíð sett av til lærarasamstarv og skúlamenning. Lærararnir samstarva um næmingar og flokkar, ráðleggja og eftirmeta í felag undirvísingina í einstøku lærugreinunum og evnunum. Hetta samstarv kann verða skipað í toymum.

Tímar til felags ráðlegging og skúlamenning kunnu m.a. nýtast til námsfrøðiligar fundir og -ráðleggingardagar, at eftirmeta og menna ítøkiligu lesiætlan skúlans, og at menna undirvísingarhættir og undirvísingarmiðlar.

Partur av hesi tíð kann eisini nýtast til støðugt samskifti millum lærarartoymi og skúlans leiðslu um, hvussu sett mál eru rokkin.

Samstarvs- og menningartímarnir kunnu ikki verða nýttir til t.d. fundir í námsfrøðiliga ráðnum, flokslæraraarbeiði ella til samstarv millum heim og skúla, og skúlans leiðsla kann ikki áleggja lærarum at nýta hesar tímar til tiltøk saman við næmingum.

Leiðslan býtir hesar tímar í samstarvi við toymini og lærararnar. Møguleiki er at geva einum toymi ella lærara fleiri og einum øðrum færri tímar til felags ráðlegging og skúlamenning. Eisini ber til at leggja tímar saman til heilar dagar á 8 tímar hvør til ráðleggingardagar og menningardagar. Skúlans leiðsla ger í samráði við toymini og lærararnar av, hvørji menningartiltøk skulu setast í verk, hvør skal luttaka, hvussu nógvir dagar skulu verða brúktir sum ráðleggingar- ella menningardagar, nær teir skulu vera o.s.fr.

Undirvísingarhugtakið

Fólkaskúlalógin leggur upp til eitt víðkað undirvísingarhugtak við m.a. næmingalagaðari undirvísing, verkætlanararbeiði í øllum flokkum og støðugari eftirmeting. Næmingurin skal hava betri møguleika at arbeiða sjálvstøðugt og gera egnar royndir. Tað gerst alt meira sjónskt, at tann tíðin, tá ið nærum øll undirvísing var floksundirvísing, er farin.

Námsfrøðiligu hugsjónirnar og lærutilgongdirnar í fólkaskúlalógini leggja upp til eitt øðrvísi undirvísingarhugtak, ið umframt floksundirvísing m.a. fatar um bólkaarbeiði, vegleiðing, ráðgeving, støðuga eftirmeting, næmingasamrøður, setursskúlar, sosial og mentanarlig tiltøk. Eitt av høvuðsendamálunum við avtaluni um arbeiðstíð er at stuðla námsfrøðiligu menningina í skúlanum og geva skúlaleiðslu og lærarum møguleika at fremja hetta í verki.

Lærarin

Lærarin hevur ábyrgdina av, at undirvísingin verður ráðløgd og skipað soleiðis, at allir næmingar fáa sínar avbjóðingar, at undirvísingin verður løgd til rættis eftir ásettum málum, og at fakliga stigið verður tryggjað, eftirmett og tillagað so hvørt.

Lærarar og næmingar skulu samstarva um innihald og arbeiðshættir í einstøku lærugreinunum, áseta mál og støðugt gera eftirmetingar, sum skulu vera grundarlag undir

arbeiðinum frameftir. Leiklutur lærarans er í høvuðsheitum í samstarvi við næmingar og aðrar lærarar at leggja til rættis lærutilgongdir, ið stuðla fjølbroyttu menning næmingsins.

Næmingalagað undirvísing og undirvísing í tvørgreinaligum evnum og spurdómum hava við sær, at krøvini at ráðleggja í felag, fyrireika og samskipa verða økt.

Skúlaleiðarin

Skúlaleiðarin hevur evstu ábyrgdina av, at dagliga virksemi skúlans verður fyriskipað soleiðis, at ásetingarnar í lógum og reglum verða fylgdar. Hann hevur bæði fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðslu skúlans.

Sum námsfrøðiligi leiðari skúlans skal hann ikki bara vera við í námsfrøðiligum orðaskifti og leiða námsfrøðiligt virksemi, men hann eigur eisini at kveikja og stuðla tílíkum virksemi og tiltøkum í skúlanum. Avtalan um arbeiðstíð lærarannaer, verður hon nýtt rætt, eitt gott amboð hjá skúlaleiðaranum at skipa og býta virksemi skúlans millum starvsfólkið soleiðis, at sett mál verða rokkin.

## Ráðleggja virksemi í skúlanum

Heildarætlan

Í góðari tíð frammanundan verður gjørd ein heildarætlan fyri virksemi skúlans komandi skúlaár. Í hesum sambandi eiga leiðsla og lærarar at viðgera:

- tímabýtið í einstøku flokkunum
- miðfirraða serundirvísing og tímar til serligan tørv
- skúladagin, herundir fríkorter og steðgir
- ársætlan fyri skúlan, herundir lærarafundir, frítíðarætlan, fundir í námsfrøðiliga ráðnum, evnisvikur, starvsvenjing, royndir, verkætlanararbeiði, menningartiltøk og onnur tiltøk
- umsjón við næmingum o.a.

Umframt hetta skulu lærararnir og lærarartoymini viðgera hesi viðurskifti:

- ársætlanir og menningartiltøk í einstaka flokkinum
- samstarv millum skúla og heim, bæði við atliti at einstaka næminginum og flokkinum sum heild
- næmingalagaða undirvísing herímillum serundirvísing í einstaka flokkinum
- mál fyri undirvísingina hjá flokkinum og einstaka næminginum
- eftirmeting

Ráðleggingin skal verða gjørt sambært almennu stevnumiðum fólkaskúlans, tímatillutan, stevnumiðum skúlans og skúlamyndugleikans á staðnum.

Dentur skal verða lagdur á, at leiðsla og lærarar í samstarvi seta sær mál fyri virksemi skúlans, og at lærarar og næmingar samstarva um at seta sær mál fyri ítøkiligu undirvísingina.

Virksemisætlan

Skúlaleiðarin skipar arbeiðstíðina í neyvum samstarvi við einstaka læraran. Skúlans leiðsla hevur framvegis evstu ábyrgdina av undirvísingardygdini. Einstaki lærarin og læraratoymið skulu framvegis, alt tað ber til, hava frælsi at skipa arbeiðstíðina innan settar karmar og hava ábyrgd av, at sett mál verða rokkin. Fyri hvønn lærara verður gjørd ein virkisætlan, ið sýnir allar uppgávur hansara.

# Avtala um arbeiðstíð hjá lærarum í føroyska fólkaskúlanum.

| | |
|---|---|
| **§ 1 Øki**<br>Avtalan er fyri lærarar í fólkaskúlanum. | |
| **§ 2 Arbeiðstíð**<br>Árliga arbeiðstíðin er 2.080 tímar fyri hvønn lærara í fullum starvi, íroknað frítíð, halgidagar og fastir frídagar. Tá ið frítíð, halgidagar og fastir frídagar eru drignir frá, er árliga arbeiðstíðin 1.800 klokkutímar. | *Viðmerking:*<br>*Arbeiðstíðin er grundað á eina 40-tíma arbeiðsviku. Frítíðin er 5 vikur (t.e. 200 tímar), og í meðal er roknað við 10 halgidøgum og føstum frídøgum ( t.e. 80 tímar), sum fella á yrkadagar.* |
| Stk. 2<br>Arbeiðstíðin verður løgd til rættis soleiðis, at hvør vika er í meðal 40 tímar<br>(8 tímar um dagin). Er mattíðin fastløgd, verður hon ikki roknað við í arbeiðstíðina. Ber ikki til at fastleggja mattíðina, verður hon roknað sum arbeiðstíð og skal verða hildin, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí. Henda fríløtan kann vera upp til hálvan tíma, og lærarin skal vera til taks, um tað er neyðugt. | |
| Stk. 3<br>Arbeiðstíðin er býtt sundur í skúlatíð og egintíð. | |
| **§ 3 Skúlatíð**<br>Skúlatíð er tíðin, umframt egintíðina, sum verður brúkt til lærarastarvið. | |
| Skúlatíðin fatar m.a. um:<br>• undirvísing t.e. pultstímar, bólkaarbeiði, valbólkaundirvísing<br>• lærarasamstarv, harímillum felags ráðlegging og toymisarbeiði<br>• skúlamenning<br>• ráðlegging og eftirmeting av undirvísingini<br>• flokslæraraarbeiði<br>• fundir í námsfrøðiliga ráðnum<br>• ansing, steðgir/fríkorter<br>• at vegleiða og ráðgeva næmingum | *Viðmerking:*<br>*Víðkaða undirvísingarhugtakið leggur upp til, at undirvísing ikki longur einans er floksundirvísing, men fatar í høvuðsheitum alt samskifti/samveru, sum lærarar hava við næmingar í skúlahøpi m.a.:*<br>• *sosial og mentunarlig tiltøk, herímillum ítróttardagar*<br>• *næmingaráð*<br>• *savns-, virkis- og aðrar vitjanir*<br>• *setursskúla*<br>• *útferðir*<br>• *skúlabókasavn*<br>• *verkætlanararbeiði/verkætlanaruppgávur*<br>• *skúlavegleiðaravirksemi kt-varðavirksemi skeið og eftirútbúgving*<br>• *foreldrafundir og sambandið millum heim og skúla*<br>• *næmingasamrøður*<br>• *ráðgeving*<br>*o.a.* |

| | |
|---|---|
| Stk. 2<br>Steðgir og fríkorter:<br>Undirvísingin verður løgd til rættis, soleiðis at so góður samanhangur sum til ber er í einstøku lærutilgongdunum. Neyðugu steðgirnar hjá næmingunum ásetur skúlans leiðsla. | *Viðmerking:*<br>*Í sambandi við heildarætlan skúlans viðgera leiðsla og lærarar nær steðgir og fríkorter skulu vera, hvussu langir undirvísingartímarnir skulu vera, og hvussu døgverðasteðgurin skal verða skipaður.*<br>*Í sambandi við fríkorter verður víst til Fólkaskúlin. Tíma- og lærugreinabýtið frá 1993 s. 46.*<br><br>***Útrokningargrundarlag:***<br>*Fyri hvønn undirvísingartíma hjá lærara verða 10 minuttir roknaðir til fríkorter, sum lærarin verður løntur fyri. Lærarin skal tí vera tøkur og taka á seg ansingaruppgávur samsvarandi heildarætlan skúlans.*<br><br>*Tíðin, sum verður sett til steðgir og fríkorter, skal í høvuðsheitum verða brúkt saman við næmingunum. Talan kann vera um umsjón t.d. í garðinum, á gongini og í skúlastovuni. Eisini í samband við matarsteðgin hjá næmingunum.*<br><br>*Leiðslan ræður yvir hesi tíðini og leiðir og fordeilir ansingaruppgávuna millum lærararnar, so samsvar er millum samlaðu tíðarrokningina hjá læraranum fyri fríkorter og áløgdu ansingaruppgávuna.* |
| Stk. 3<br>Er álagt lærara at hava ansingarskyldu undan fyrsta undirvísingartíma í skúlanum, telur tíðin við í skúlatíðini. | |
| Stk. 4<br>Leiðslan leggur til rættis og skipar skúlatíðina, alt tað ber til, í samráði við lærararnar. Arbeiðsstaðurin kann vera í skúlanum ella uttan fyri skúlan.<br>Virksemisætlan verður gjørd fyri hvønn lærara sær. | *Viðmerking:*<br>*Virksemisætlan*<br>*Virksemisætlan skal gerast fyri hvønn einstakan lærara. Ætlanin kann vera gjørd fyri styttri tíð enn eitt heilt skúlaár. Í virksemisætlanini skulu standa allar uppgávur lærarans og frammanundan mett tíðarnýtsla til tær. Leiðsla og lærari gera ætlanina í felag. Um ein virksemisætlan sýnir meira enn fulla tíð, skal ein yvirtíðarútrokning gerast. Yvirtíð verður útgoldin, tá ið uppgjørt verður. Lærarin skal hava virksemisætlanina í minsta lagi 4 vikur, áðrenn hon kemur í gildi.*<br>*Partar av tímunum í virksemisætlanini kunnu flytast til „aðrar uppgávur". Leiðslan umsitur hesar tímar.*<br><br>*Um ein virksemisætlan sýnir meira enn fulla tíð, verður yvirtíð roknað. Yvirtíð verður útgoldin mánaðarliga saman við sáttmálalønini. Yvirtíðarsatsurin er 39% á tí flokkingarstigi, lærarin er á.*<br><br>*Leiðsla og lærarar ráðleggja í samráði komandi skúlaár eftir galdandi námsfrøðiligum og fyrisitingarligum reglum og rundskrivum. Heildarætlan verður gjørd fyri alt virksemi skúlans hvørt skúlaár. Heildarætlanin krevur, at neyvt og gott samskifti er millum leiðslu og lærarar, tá ið skúlaárið verður ráðlagt.* |

| | |
|---|---|
| | *Heildarætlan skúlans skal fata um:*<br><br>*tíma- og lærugreinabýtið serundirvísing*<br>*garðvaktir og aðrar ansingaruppgávur*<br>*verkætlanir evnisvikur foreldrafundir*<br>*fundir í námsfrøðiliga ráðnum*<br>*royndir sosial- og mentunarlig tiltøk*<br>*o.a.* |
| Stk. 5<br>Fyri hvønn lærara í fullum starvi verða 120 klokkutímar settir av til felags ráðlegging og eftirmeting,<br>lærarasamstarv og skúlamenning. Hvør lærari skal hava í minsta lagi 50 klokkutímar um árið. Hesir tímar kunnu leggjast saman til heilar dagar og skipast sum ráðleggingar- og menningardagar. | *Viðmerking:*<br>*Til tess at skapa so góðar fortreytir sum gjørligt hjá børnum at læra og mennast, verða tímar settir av til lærarasamstarv og skúla menning. Leiðslan býtir hesar tímar í samstarvi við lærararnar. Møguleiki er at geva einum lærara fleiri og einum øðrum færri tímar til ráðlegging, eftirmeting, samstarv ella menning.*<br>*Eisini ber til at leggja tímar saman til heilar dagar á 8 tímar hvør til ráðleggingar – og menningardagar.*<br>*Skúlans leiðsla ger í samráði við lærararnar av, hvussu nógvir dagar verða brúktir sum ráðleggingar- ella menningardagar og nær, teir skulu vera.*<br>*Áðrenn tímarnir verða býttir, eiga hesi viðurskifti at verða umrødd:*<br>- *skúlamenningartiltøk í skúlaárinum*<br>- *lærarasamstarv, herímillum toymi, felags ráðlegging, lærugreinabólkar o.a.* |
| *Stk. 6*<br>Frá skúlaársbyrjan tað skúlaárið, lærari fyllir 60, verða skúlatíðin og egintíðin lækkaðar soleiðis:<br><br>• Hevur lærari millum 19 og 22 undirvísingartímar um vikuna, verður skúlatíðin lækkað 187,5 og egin tíðin 125 lækkað tímar um árið.<br>• Hevur lærari millum 14 og 18,99 undirvísingartímar um vikuna, verður skúlatíðin lækkað 150 og egintíðin 100 tímar um árið.<br>• Hevur lærari millum 10 og 13,99 undirvísingartímar um vikuna, verður skúlatíðin lækkað 112,5 og egintíðin 75 tímar um árið.<br>• Hevur lærari millum 6 og 9,99 undirvísingartímar um vikuna, verður skúlatíðin lækkað 75 og egintíðin 50 tímar um árið.<br>• Hevur lærari millum 3 og 5,99 undirvísingartímar um vikuna, verður skúlatíðin lækkað 37,5 og egintíðin 25 um árið.<br><br>Tala serligar heilsuligar grundir fyri tí, kann lærari, sum ikki er fyltur 60 ár, fáa somu sømdir. | *Viðmerking:*<br>*Hjá lærara, sum vegna serligar heilsuligar grundir hevur søkt um og fingið lækkað tímatal, hevur hetta gildi frá 1. í mánaðinum aftaná, at avgerð er tikin um hetta. Er tað aftaná 1. august, verður lækkaða tímatalið roknað lutfalsliga.* |

| | |
|---|---|
| Lærari, sum hevur lækkaða skúlatíð eftir hesum ásetingunum, kann ikki hava yvirtíð og fáa útgoldið yvirtíðargjald | |
| **§ 4 Egintíð**<br>Egintíðin er tann tíð, ið lærarin nýtir til at<br>• ráðleggja, fyrireika og eftirmeta undirvísingina og fundarvirksemi<br>• gera ársætlanir<br>• samskifta við foreldur uttan fyri vanliga arbeiðstíð | *Viðmerking:*<br>*Tíðin, sum verður nýtt í gerandisdegnum at dagføra fakliga og námsfrøðiliga vitan t.d. at lesa fakligan lesnað, tíðarrit o.a. er partur av egintíðini.* |
| Stk. 2<br>Fyri hvønn undirvísingartíma á 45 minuttir, er egintíðin 30 minuttir.<br>Egintíðina skipar lærarin sjálvur. | *Viðmerking:*<br>*Lærarin ræður fult og heilt yvir egintíðini og tí kann leiðslan ikki áleggja honum aðrar uppgávur í hesum partinum av arbeiðstíðini.* |
| Stk. 3<br>Tíðin til skúlabókasavn, skúlavegleiðing, starvsvenjing og telduvørð verður býtt sundur í undirvísingartímar og tímar til fyrisiting.<br><br>Tá ið tímar verða veittir til fyrisiting, skal verða havt í huga, at í egintíðini er tíð veitt til fundarfyrireiking, eftirmeting og vanligu dagføringina av fakligari vitan. | *Viðmerking:*<br>*Tímarnir til fyrisiting verða gjørdir upp sum klokkutímar við ongari egintíð. Tímar til hesar seruppgávur og aðrar seruppgávur eru ásettar í avtaluni um ískoyti til arbeiðstíðaravtaluna.* |
| **§ 5 Niðursett arbeiðstíð**<br>Hjá lærarum, sum hava niðursetta arbeiðstíð, verða ásettu tímarnir í § 2, stk. 1, § 3, stk. 5, § 4 og § 8, stk. 3 lækkaðir. Tímarnar at ráðleggja og menna skúlan kann leiðslan lækka. Teir skulu tó ikki verða lækkaðir meiri enn lutfalsliga. | *Viðmerking:*<br>*Fyri lærarar, sum arbeiða niðursetta tíð, kann leiðslan lækka tímatalið til menning og samstarv, tó ongantíð meira enn lutfalsliga. Orsøkin til hetta er, at lærari, sum hevur niðursetta tíð, í summum førum hevur líka nógvar tímar til aðrar uppgávur sum lærari í fullum starvi* |
| Stk. 2<br>Lærari, sum hevur niðursetta arbeiðstíð, fær bara yvirtíðargjald fyri álagt arbeiði út um fulla arbeiðstíð, sum er 1800 klokkutímar um árið ella í meðal 40 klokkutímar um vikuna. | *Viðmerking:*<br>*Arbeiðir lærari hálva tíð, er setanarbrøkurin 0,5 og arbeiðstíðin í meðal 20 klokkutímar um vikuna. Fyri tímarnar, sum eru millum setanarbrøkin hjá læraranum og fullan setanarbrøk, sum í meðal er 40 klokkutímar um vikuna, verður goldin vanlig tímaløn.* |
| **§ 6 Virksemisætlan**<br>Fyri hvørt skúlaár verður gjørd virksemisætlan fyri hvønn lærara. Ætlanin vísir uppgávurnar hjá læraranum og mettu tímanýtsluna. | *Viðmerking:*<br>*Virksemisætlan kann verða gjørd fyri styttri tíð enn eitt heilt skúlaár.* |
| Stk. 2<br>Lærarin fær virksemisætlanina í seinasta lagi 4 vikur áðrenn hon fær gildi. | |
| Stk. 3<br>Í virksemisætlanini kunnu verða ásettir 120 klokkutímar um árið til vikararbeiði. | *Viðmerking:*<br>*Høvuðsendamálið við tímatalinum til vikararbeiði er at hava tímar tøkar, tá ið lærarar eru burturstaddir. Tað kann eisini vera trupult í summum førum at fáa árstímatalið at ganga upp. Møguleiki skal tí vera at lesa írestandi tímar sum vikartímar.* |

| | |
|---|---|
| **§ 7 Skipan av arbeiðstíðini**<br>Arbeitt verður vanliga frá mánadegi til fríggjadag. | *Viðmerking:*<br>*Ásetingarnar í hesi greinini eru um, hvussu skúlatíðin verður skipað.* |
| Stk. 2<br>Verður lærara álagt at arbeiða leygardag, sunnudag ella skeivan halgidag, telja tímarnir við í ársuppgerðini. Umframt verður veitt gjald fyri ólagaliga arbeiðstíð. | *Viðmerking:*<br>*Gjøldini eru ásett í § 9.* |
| Stk. 3<br>Meginreglan er, at arbeiðstíðin hvønn dag skal vera í einum. | |
| Stk. 4<br>Fyri lærara í fullum starvi, har alt arbeiðið er í fólkaskúlanum, kann arbeiðstíðin í mesta lagi verða býtt í tveir partar 80 ferðir um árið. | *Viðmerking:*<br>*Hetta merkir, at lærari í meðal kann hava í mesta lagi tvey glopp í tímatalvuni um vikuna, sum ikki telja við í arbeiðstíðini.*<br>*Øll onnur glopp telja við í arbeiðstíðini. Undirvísir lærari t.d. ikki triðja og fjórða tíma, men undirvísir annan og fimta tíma, telja triði og fjórði tímin 110 min. (2x55 min.) í ársuppgerðini, t.e. tvær ferðir 45 min. fyri báðar undirvísingartímarnar og tvær ferðir 10 min. fyri fríkorterini. Hesar tímarnar ræður leiðslan tó yvir og álagt kann verða lækaranum at røkja aðrar arbeiðsuppgávur. Fær lærari í seinasta lagi dagin fyri boð um at undirvísa í millumtímanum, fær hann tó eisini egintíð fyri tíman í ársuppgerðini.*<br><br>*Í sambandi við samskipað størv, t.d. sum lærugreinaráðgevi, kann arbeiðstíðin verða býtt oftari sundur.* |
| Stk. 5<br>Til fundarvirksemi, mentanarlig tiltøk o. l., har neyðugt er at hava samskifti við onnur um kvøldið, kann arbeiðstíðin í mesta lagi verða býtt sundur 20 ferðir um árið. | *Viðmerking:*<br>*Talan kann t.d. vera um samskifti við foreldur. Er talan um ólagaliga arbeiðstíð, verða gjøldini veitt, sum ásett eru í § 9.* |
| Stk. 6<br>Er arbeiðstíðin ein dag býtt í tríggjar partar, telja brúktu tímarnir í ársuppgerðini. Dagurin telur tó í minsta lagi sum 8 tímar. | *Viðmerking:*<br>*Er lærarin samanlagt bundin í 9 tímar, telur tað sum 9 tímar í ársuppgerðini. Er hann bundin í 6 tímar, men teir 6 tímarnir eru býttir í tríggjar partar, telur dagurin sum 8 tímar í ársuppgerðini.* |
| Stk. 7<br>Lærari kann eftir avtalu sjálvboðin ein frídag átaka sær tænastu, sum ikki kann bíða. Tímarnir, sum brúktir eru, verða samsýntir sum yvirtímar. | *Viðmerking:*<br>*Yvirtíðargjald er ásett í § 10.* |
| Stk. 8<br>Tá ið jólahald, próvtøka, seturskúli o.l. er, verður vanliga undirvísingin løgd um. Tímarnir, lærarin skuldi havt undirvíst ella annað, og egintíðin, sum knýtt er at tí, verður ikki tald við í ársuppgerðini. Í staðin verða tímarnir, hann veruliga er bundin, taldir við. | *Viðmerking:*<br>*Tá ið virksemisætlanirnar verða lagdar, skal verða strembað eftir, at allar uppgávur lærarans og frammanundan mett tíðarnýtsla til tær verða skrásettar. Tó eigur møguleikin at umleggja arbeiðstíðina at vera til staðar – t.d. tá ið roynd verður fyriskipað. Grundarlagið er tá, at samlaða arbeiðstíðin hjá lærara er óbroytt – hon er bara umløgd.* |

| | |
|---|---|
| **§ 8 Frávera**<br>Er lærari burtur dagar, tí hann er sjúkur ella hevur annað lógligt forfall, telur ráðlagda arbeiðstíðin við í tímauppgerðini. | |
| Stk. 2<br>Hevur lærari lógligt forfall ella lógliga fráveru (t.d. er sjúkur) í øllum førum í 4 vikur, telur lutfalsligur partur við í tímauppgerðini fyri uppgávur, sum ávíst tímatal er avtalað fyri. | *Viðmerking:*<br>*Avtalað kann t.d. verða, at lærari fær 50 tímar at røkja eitt savn. Hann avger í høvuðsheitum sjálvur, nær arbeiðið verður gjørt. Tað er ikki t.d. ásett, at hann skal vera á savninum mánadag frá 10 –12. Er hann sjúkur leingi, í t.d. 3 mánaðir, telur lutfalsligi parturin av teimum 50 tímunum í tímauppgerðini.*<br><br>*Avleiðingin verður, at neyðugt er at taka støðu til, um fleiri tímar skulu verða tillutaðir ella um uppgávan skal verða avmarkað.* |
| Stk. 3<br>Hevur lærari barnsburðarfarloyvi, telur hvør dagur sum 8 tímar í ársuppgerðini. | *Viðmerking:*<br>*Verður roknað við 1800 tímum um árið, telja halgidagarnir og fastir frídagar í barnsburðarfarloyvistíðini ikki við í uppgerðini, bara gerandisdagarnir. Er lærari t.d. í barnsburðarfarloyvi á páskum, telja skírisdagur, langi fríggjadagur og 2. páskadagur ikki við í uppgerðini. 1800 tímar eru bara arbeiðsdagarnir, sí § 2, stk. 1.* |
| Stk. 4<br>Samskipað størv ella líknandi verða roknað við í arbeiðstíðina hjá læraranum eftir ítøkiliga avtalaðu ásetingunum. | *Viðmerking:*<br>*Talan er t.d. um lærugreinaráðgevar, serlærarar og serráðgevar.* |
| **§ 9 Gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð.**<br>Fyri ólagaliga arbeiðstíð verða veitt hesi gjøld:<br><br>Gerandisdagar millum kl. 17.00 og 08.00: vaktargjald I og tímarnir telja við í arbeiðstíðini.<br><br>Vikuskifti og halgidagar: gjald II og tímarnir telja við í arbeiðstíðini.<br><br>Vaktargjøldini verða ikki veitt saman við yvirtíðarløn. | *Viðmerking:*<br>*Gjøldini verða veitt fyri m.a. foreldraviðtalur, fundir o.a. sum eru ásett og góðkend í heildarætlanini. Hetta eru uppgávur, sum lærarin ikki sjálvur avger, nær tær verða loystar, men sum eru álagdar at vera ávísa tíð.*<br><br>*Vaktargjald verður veitt fyri tíðina, sum er innanfyri teir 1800 tímarnar, sum er full tíð. Tímarnir, sum liggja omanfyri teir 1800 tímarnar, eru yvirtíð. Tá verður yvirtíðargjald veitt og ikki vaktargjald.* |
| Stk.2<br>Fyri setursskúla og onnur tiltøk, tá ið gist verður, verður latin føst upphædd fyri hvønn byrjaðan dag. Tá verða vaktargjald I og vaktargjald II ikki veitt. | *Viðmerking:*<br>*Fasta gjaldið fyri setursskúla og onnur tiltøk, tá ið gist verður, er kr. 100,- fyri hvønn byrjaðan dag* |
| **§ 10 Yvirtíð**<br>Ein og hvør lærari hevur skyldu til at lesa yvirtímar í tí vavi, tørvur er hjá skúlanum. | *Viðmerking:*<br>*Hetta er ikki partur av tímunum, sum eru umrøddir í § 6, stk. 3* |

| | |
|---|---|
| Hevur lærari í arbeiðsætlanini meiri enn 1.800 klokkutímar, verður yvirtíð goldin so hvørt, hvønn mánað. | *Viðmerking:*<br>*Tímalønin verður roknað sum árslønin á viðkomandi lønarstigi býtt við 2080.* |
| **§ 11 Vikartímar**<br>Lærari hevur skyldu at lesa álagdar vikartímar. Vikartímar verða býttir í tveir bólkar:<br>• Vikarurin er lærari í skúlanum<br>• Lærarалærdur uttanífrá | *Viðmerking:*<br>*Ein vikartími telur tað sama sum ein undirvísingartími – t.e. 85 minuttir. Lærari, ið lesur vikartíma, hevur tí skyldu at fyrireika undirvísingina. Hetta tó treyða av, at hann fær boð um vikartíman ikki seinni enn dagin fyri.*<br>*Fyri lisnan vikartíma hevur lærari ansingarskyldu í fríkorterinum eftir tíman ella í matarsteðginum, um so er, at vikartímin er síðsta tíma fyri matarsteðgin – tó ikki meira enn 10 minuttir fyri hvønn undirvísingartíma.* |
| Stk. 2<br>Í virksemisætlanini kunnu verða ásettir 120 klokkutímar um árið til vikararbeiði. | *Viðmerking:*<br>*Høvuðsendamálið við tímatalinum til vikararbeiði er at hava tímar tøkar, tá ið lærarar eru burturstaddir. Tað kann eisini vera trupult í summum førum at fáa árstímatalið at ganga upp. Møguleiki skal tí vera at lesa írestandi tímar sum vikartímar.* |
| Stk. 3<br>Eingin lærari kann krevja at fáa yvirtímar tillutaðar. | |
| **§ 12 Gildiskoma**<br>Avtalan hevur gildi frá 1. august í 2016. | |
| Stk. 2<br>Avtalan kann verða søgd upp við 6 mánað freist til endan av einum skúlaári. | |

## Avtalur, sum eru ískoyti til arbeiðstíðaravtaluna

| | |
|---|---|
| **§ 1 Flokslærari**<br>Fyri flokslæraraarbeiði verða latnir 4 tímar fyri hvønn næming í 1. fl.<br>Fyri flokslæraraarbeiði verða latnir 3 tímar fyri hvønn næming um árið í 2. – 10. fl. | *Viðmerking:*<br>*Flokslærarauppgávan er lýst í rundskrivi* |
| **§ 2 Skúlabókavørður**<br>Til bókasavn verða latnir 2,98 klokkutímar um árið til hvønn næming. Egintíð er roknað við í hesum talinum. Einki verður latið fyri 20 teir fyrstu næmingarnar. | *Viðmerking:*<br>*Tímarnir, bókasavnið er opið, telja sum undirvísingartímar, t.e. 85 minuttir hvør. Tímar til fyrisiting telja sum vanligir klokkutímar.*<br><br>*Teir skúlar sum hava færri enn 3,5 tímar til bókasavn um vikuna, verður eingin tíð sett av til fyrisiting.* |
| *Stk. 2.* Tímarnir verða býttir millum undirvísingartímar og tímar til fyrisiting í lutfallinum 6/7 partar til undirvísing og 1/7 til fyrisiting. Undirvísingartímarnir eru til at hava bókasavnið opið í. | |
| **§ 3 Skúlavegleiðari**<br>Til skúlavegleiðing verða latnir 1,24 klokkutímar fyri hvønn næming í 7. – 10. flokki um árið. Tíðin til skúlavegleiðing verður býtt millum undirvísingartímar og tímar til fyrisiting í lutfallinum 4/5 til undirvísing og 1/5 til fyrisiting. | *Viðmerking:*<br>*Tímar til undirvísing telja 85 min., egintíðin íroknað.* |
| *Stk. 2.* Til at fyrireika og skipa starvsvenjing verða latnir 1,49 klokkutímar fyri hvønn næming í 9. og 10. flokki um árið. Tíðin til starvsvenjingina verður býtt millum undirvísingartímar og tímar til fyrisiting í lutfallinum 1/5 til undirvísing og 4/5 til fyrisiting. | |
| **§ 4 KT-vørður:**<br>Tíð til uppgávur hjá KT-vørðinum verður latin soleiðis:<br>1,09 klokkutími um árið fyri hvønn næming og 2,48 klokkutímar um árið fyri hvørja teldu og 1,24 klokkutímar um árið fyri hvønn lærara.<br><br>Tímarnir verða býttir millum tímar til undirvísing og til tímar til fyrisiting í lutfallinum 1/5 til undirvísing og 4/5 til fyrisiting. | |
| **§ 5 Skrivari í námsfrøðiliga ráðnum**<br>Á skúlum, sum hava millum 2 og 16 lærarar, fær skrivarin í námsfrøðiliga ráðnum 23,79 tímar um árið.<br><br>Á skúlum, sum hava millum 17 og 33 lærarar, fær skrivarin í námsfrøðiliga ráðnum 1,49 tímar fyri hvønn lærara um árið.<br><br>Á skúlum, við fleiri enn 33 lærarum, fær skrivarin í námsfrøðiliga ráðnum 49,50 tímar um árið. | *Viðmerking:*<br>***Fólkaskúlalógin § 56:***<br>*Til hvønn skúla, sum í minsta lagi hevur 20 næmingar og 2 lærarar verður stovnað eitt námsfrøðiligt ráð at ráðgeva skúlaleiðaranum. Limir í ráðnum eru øll tey samstarvsfólk, ið hava undirvísingarligar og aðrar námsfrøðiligar uppgávur í skúlanum* |

| | |
|---|---|
| **§ 6 Skeið**<br>Tá ið lærari er á styttri skeiði, verður hvør dagur roknaður við tí tíð, sum skeiðið er, tó í mesta lagi 8 tímar um dagin. | *Viðmerking:*<br>*Skeiðið skal verða góðkent sambært galdandi mannagongd. Longri skeið t.d. eftirútbúgving og eyka skeið í føroyskum, verða samsýnt eftir øðrum reglum* |
| **§ 7 Seturskúli**<br>Seturskúli og líknandi verður roknaður sum 14 tímar hvørt døgnið. Brotin døgn verða roknað lutfalsliga. | *Viðmerking:*<br>*Samsýningarnar verða veittar fyri setursskúlar o.a., sum er avtalað við leiðsluna. Samsýningarnar eru grundaðar á, at ein lærari er fyri hvørjar 15 næmingar.* |
| Stk. 2<br>Ferðir, sum eru longri enn tveir dagar, verða roknaðar sum 10 tímar fyri hvørt døgnið, sum fer út um tvey døgn. Brotin døgn verða roknað lutfalsliga. | |
| Stk. 3<br>Brádliga íkomin setursskúli verður roknaður samsvarandi § 7, men gevur ikki yvirtíð. Avroknað verður á tí lønarstigi, lærarin er á. | *Viðmerking:*<br>*Brádliga íkomin setursskúli er, tá ið ein lærari hevur fingið forfall, og annar lærari fer á setursskúla ístaðin, ella tá ið lærari og leiðsla semjast um ein setursskúla, stutt undan hann verður hildin.*<br>*Víst verður til semju frá 15. apríl í 2005* |
| **§ 8 Tíð til at rætta o.a.**<br>Fyri at rætta skrivligar uppgávur í 8. – 10. flokki í føroyskum, donskum, støddfrøði og enskum, verður henda tíðarútrokning nýtt:<br><br>Framseting ella samsvarandi uppgáva í vavi í føroyskum, enskum og donskum í 8. flokki:<br>• 15,00 minuttir fyri hvørt avrik<br><br>Framseting ella samsvarandi uppgáva í vavi í føroyskum, enskum og donskum í 9. og 10. flokki:<br>• 20,00 minuttir fyri hvørt avrik<br><br>Fyrisøgn og máluppgáva ella samsvarandi uppgáva í vavi:<br>• 15,00 minuttir fyri hvørt avrik<br><br>Greiðslurokning ella samsvarandi uppgáva í vavi 8. – 10. fl.:<br>• 15,00 minuttir fyri hvørt avrik<br><br>Fimisrokning ella samasvarandi uppgáva í vavi:<br>• 10,00 minuttir fyri hvørt avrik<br><br>Fyri avrik í fyrisøgn, máluppgávu og í fimisrokning, sum verða rættað talgilt, verður roknað hálv tíðaráseting. | *Viðmerking:*<br>*Galdandi fyri allar skrivligar uppgávur er, at tær eru samsvarandi próvtøkuuppgávu í vavi – tær kunnu tó verða býttar upp í fleiri partar.* |
| *Stk. 2*<br>Í lærugreinini heimkunnleiki verða 12,5 minuttir latnir eyka fyri hvønn tíma. | *Viðmerking:*<br>*Fyri hvønn klokkutíma verða latnir 12,5 minuttir eyka. Verður roknað við tímum, sum eru 45 minuttir, verða latnir 9,375 minuttir (t.e. 12,5*45/60)* |

| | |
|---|---|
| *Stk. 3*<br>Fyri at undirvísa næmingum við serligum tørvi verða 12,5 minuttir latnir eyka fyri hvønn tíma. | *Viðmerking::*<br>*Fyri hvønn klokkutíma verða latnir 12,5 minuttir eyka. Verður roknað við tímum, sum eru 45 minuttir, verða latnir 9,375 minuttir (t.e. 12,5*45/60)* |
| *Stk. 4*<br>Tíðin í stk. 1 verður ásett eftir næmingatalinum 1. september í hvørjum skúlaári. | |
| **§ 9 Próvtøka, próvdøming, royndarhald, vaktarhald o.a.**<br>Vaktarhald til skrivliga próvtøku og skrivliga roynd verður roknað sum tann tíðin, sum brúkt er á staðnum. Ber til at ráðleggja hetta, tá ið virksemisætlanin verður løgd, eigur tað at verða gjørt. Tímar til vaktarhald o.a. verða skrásettir og undirvísingartímarnir avlýstir. | |
| Stk. 2<br>Tá ið vaktarhald ikki er skrásett í virksemisætlanini, kunnu teir undirvísingartímar, ið ikki verða lisnir, tí næmingarnir eru til próvtøku ella roynd, verða avgreiddir soleiðis:<br>1. Lisnir sum fríir vikartímar í øðrum flokkum<br>2. Umroknaðir til klokkutímar til vaktarhald | *Viðmerking:*<br>*Grundleggjandi er tað galdandi, tá ið arbeiðstíð verður umløgd, at lærarin arbeiðir líka nógv, sum hann skuldi havt gjørt samsvarandi virksemisætlanini.*<br><br>*Hvør undirvísingartími er 85 minuttir. Tá ið vaktarhald er, og undirvísingartímar verða ikki lisnir, men lærari heldur vakt ístaðin, verður ein umrokning gjørd, so at lærarin heldur vakt samsvarandi við ta tíð, hann hevur fingið tillutað í virksemisætlanini til avlýstu undirvísingina. Lærarin kann eisini lesa aðrar undirvísingartímar.*<br><br>*Dømi:*<br>*15 undirvísingartímar umroknaðir til vaktartímar:*<br>*15*85/60= 21 klokkutímar og 15 minuttir.* |
| Stk. 3<br>Tá ið lærari er 1. próvdómari, 2. próvdómari og tilnevndur próvdómari til fráfaringarroyndir fólkaskúlans, verður tíðin, sum brúkt verður, roknað við í ársuppgerðini. Tillutaða tíðin skal vera til millum annað fyrireiking og sjálva próvtøkuna. | *Viðmerking:*<br>*Tímatalið kann vera ymiskt hjá 1. og 2. próvdómara, alt eftir hvussu nógvar tímar uppgávan tekur.* |
| Stk. 4<br>Ráðlagda undirvísingin og egintíðin, sum er knýtt at undirvísingini, sum lærarin ikki hevur, tí hann er próvdómari, verður avlýst og telur ikki við í ársuppgerðini. | *Viðmerking viðv. munnligari roynd:*<br>*Lærarin, sum førir upp, fær 20 min. fyri hvønn næmingin, tó í minsta lagi 1 tíma samanlagt.*<br><br>*Tá ið lærari er próvdómari á øðrum skúla, telur hvør próvtøkudagur 8 tímar (40/5) í árligu arbeiðstíðini.* |
| Stk. 5<br>Mest loyvda talið av próvtakarum um dagin til munnliga próvtøku er 20. | |

| | |
|---|---|
| Stk. 6<br>Fyri vaktarhald, sum fellur millum kl. 17.00 og 08.00 gerandisdagar, verður vaktargjald 1 veitt.<br><br>Fyri vaktarhald, sum fellur halgidagar ella um vikuskifti, verður vaktarhald 2 veitt. | |
| **§ 10 Akkerslærari**<br>Fyri at stuðla og vegleiða nýútbúnum lærarum fyrsta starvsárið, verður skipan við akkerslærara gjørd. | |
| Stk. 2<br>Fyri hvønn nýútbúnan lærara, verða fyrsta starvsárið avsettir 40 klokkutímar til akkerslærara. Hesir tímar eru ætlaðir til vegleiðing, fakliga og fyrisitingarliga hjálp og stuðul. | |
| Stk. 3<br>Leiðsla, akkerslærari og nýsetti lærarin samskipa tilgongdina, og tímajáttanin til akkerslæraran er til samlaðu uppgávuna við fyrireiking o.a. Tímarnir kunnu verða býttir ímillum tveir lærarar, ið røkja akkersuppgávuna. | |

**Tórshavn 4. mars í 2016**

____________________________ ____________________________

**Fíggjarmálaráðið** **Føroya Lærarafelag**